# Umsókn um vinnubræv sum kølimontørur

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

undir Bryggjubakka 27 | 100 Tórshavn | Tel +298 664400 | arb@arb.fo

**Umsøkjari**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn | | Føðingar-dagur | |
| Bústaður | | Postnr. | |
| Teldupostur | | Bygd/ býur | |
| Starvsheiti | | Telefon | |

**Søkt verður um vinnubræv til**

- ☐ Løggilding A: Skipanir við meira enn 2,5 kg og minni enn 50 kg av kølievni í bólki 2.
- ☐ Løggilding B: Skipanir við meira enn 2,5 kg av kølievni í bólki 2.
- ☐ Løggilding C: Skipanir við meira enn 2,5 kg av kølievni og minni enn 50 kg av kølievni, óansæð slag av kølievni.
- ☐ Løggilding D: Skipanir við meira enn 2,5 kg av kølievni, óansæð slag av kølievni.
- ☐ Løggilding E: Staðbundin løggilding til skipanir í bólkunum A, B, C og D, har montørurin er í starvi á fyritøkuni, ið eigur skipanina.

Løggilding til flokk B er eisini galdandi fyri flokk A.
Løggilding til flokk C er eisini galdandi fyri flokk A og B.
Løggilding til flokk D er eisini galdandi fyri flokk A, B og C.

**Hesi skjøl skulu sendast við**

- Útbúgvingarprógv, sveinabræv ella líkandi
- Stutt frágreiðing um arbeiðsroyndir við køli-/frystiskipanum
- Váttan frá arbeiðsgevara um arbeiðsroyndir við køli-/frystiskipanum
- Passmynd, sum ikki er eldri enn 2 ár.

Oyðublaðið og tilhoyrandi skjøl skulu sendast Arbeiðs- og brunaeftirlitinum við telduposti til arb@arb.fo ella við vanligum posti til:
Arbeiðs- og brunaeftirlitið, undir Bryggjubakka 27, 100 Tórshavn

Málið verður ikki viðgjørt fyrr enn hesi skjøl fyriliggja

| | | | |
|---|---|---|---|
| Staður og dagfesting | | Undirskrift | |

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

undir Bryggjubakka 27 | 100 Tórshavn | Tel +298 664400 | arb@arb.fo

## Vegleiðing

Løggilding sum kølimontørur í flokkunum A, B, C, D og E verður givin til umsøkjara, sum:

1. er fyltur 18 ár,
2. hevur neyðuga útbúgving, og
3. hevur neyðugar førleikar

Við "neyðuga útbúgving" sambært nr. 2 meinast, at viðkomandi hevur tikið eina viðkomandi longri útbúgving og hevur útbúgvingarprógv frá hesi. Talan kann antin vera um eina sjálvstøðuga útbúgving, t.d. sveinaútbúgving sum køliteknikari, maskinmeistari, verkfrøðingur o.a. Nøktandi útbúgving er eisini handverkaraútbúgving, t.d. elektrikari, maskinsmiður, maskinistur o.a., við einum viðkomandi ískoyti innan kølitøki.

Við "neyðugar førleikar" sambært nr. 3 meinast, at viðkomandi sum liður í síni útbúgving, skeiðum ella arbeiðsroyndum hevur fingið niðanfyristandandi vitan og førleikar:

1. Kennir til kølitøkni, m.a.:
    a) bygnað og funktión hjá køliskipanum o.ø.,
    b) stýring og automatik í køliskipanum o.ø.,
    c) at gera einfaldar termiskar útrokningar, og
    d) val av kølievni.
2. Kennir til at skoyta og montera koparrør.
3. Kann framleiða eina tætta rørskipan á ein handverksliga rættan hátt.
4. Kennir til bygnaðin av einføldum relestýringum.
5. Kennir til montering og rakstur av køliskipanum o.ø.
6. Kann velja rættar komponentar og gera neyðugu skjalfestingina.
7. Hevur verkligan kunnleika til, hvussu ítøkiliga slagið av kuldaskipan verður uppbygt o.a., og hvussu hendan verður handað rakstrarklár við neyðugum skjølum.
8. Kann finna feilir, kann rætta feilir og kann taka niður kuldaskipanir o.a.
9. Sjálvstøðugt kann fremja lekaroynd, samstundis sum gáað verður eftir rýmingarmannagongdum og við vitan um alarmskipanir.
10. Kennir til lóggávu, standardir og fakliga siðvenju, ið er galdandi fyri kuldaskipanir o.a.
11. Kann greiða frá mannagongdini, umhvørvisreglum og trygdarreglum, áðrenn kølievni verður áfylt í skipanina.
12. Kann áfylla kølievni og onnur evnir í røttum nøgdum í samsvari við galdandi ásetingar.
13. Kennir til uppdeilingina av kølievnum í bólkar (bólk 1 og 2), hvørji árin hesi hava á umhvørvið og líknandi umhvørvisásetingar.
14. Kann gera kanning av skipanum, áðrenn tær verða settar í verk.
15. Kennir til lekakanningar.
16. Kann gera lekakanningar.
17. Kann handfara skipanir á ein umhvørvisvinarligan hátt í sambandi við uppseting, viðlíkahald, tænastueftirlit og endurnýtslu.
18. Kann uppseta, seta í verk og viðlíkahalda/gera tænastueftirlit við skrúvu-/stempulkompressarum, luft- og vatn kølandi kondensatorar, fordamparar, termostatiskar ekspansiónsventilar (TEV) og aðrar komponentar.
19. Dugir at leggja til rættis og stýra uppseting av rørum á kuldaskipanum o.ø. út frá fyriliggjandi ætlanum, umframt dugir at finna møguligar feilir og manglar á viðkomandi ætlanum.
20. Sjálvstøðugt kann seta í verk og stilla skipanina til ásettu rakstrarparametrini, m.a. dugir at nýta KT tól til stilling og eftirlit við kompressarum og stýring av fordamparum.
21. Kann leggja til rættis og fremja niðurtøku av kuldaskipanum o.ø. á ein slíkan hátt, at handfaring og burturbeining av kølievnunum fer fram eftir galdandi ásetingum.
22. Sjálvstøðugt kann kontrollera og eftirmeta trygdarfyriskipanir.
23. Kann vegleiða eigaran ella ábyrgdarhavandi brúkaran um, hvussu kuldaskipanin verður nýtt og viðlíkahildin o.a. á ein rættan og tryggan hátt.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

undir Bryggjubakka 27 | 100 Tórshavn | Tel +298 664400 | arb@arb.fo

Eru førleikarnir fingnir sum liður í arbeiði við køliskipanum o.tíl. skal umsøkjarin kunna skjalfesta, at hann innan fyri seinastu 10 árini hevur arbeitt í meira enn 2 ár við køliskipanum, ið innihalda meira enn 2.5 kg av kølievni, og hevur neyðuga vitan um galdandi reglur og heilsukrøv og umhvørviskrøv.

Tá talan er um skipanir í flokkunum C og D, skal viðkomandi harumframt:

1. kenna til rakstur av ammoniakkskipanum,
2. hava skjalfest eitt tíðarskeið á minst 6 mánaðir við starvsvenjing, har viðkomandi hevur arbeitt upp á køliskipanir o.a., ið innihalda meira enn 2.5 kg og minni enn 50 kg kølievni í bólki 1 fyri køliskipanir í bólki C,
3. hava skjalfest eitt tíðarskeið á minst 6 mánaðir við starvsvenjing, har viðkomandi hevur arbeitt upp á køliskipanir o.a., ið innihalda 50 kg ella meira kølievni í bólki 1 fyri køliskipanir í flokki D, og kenna reglurnar, ið eru galdandi fyri umvæling og inntriv í køliskipanir o.a., ið innihalda ammoniakk, isobutan og líknandi.